

*Bon Jovi fær sløk 30.000 fólk á Madison Square Garden upp á kók. Showið hjá bólkinum er topptrimmað og sera undirhaldandi við teimum mongu hittunum, teir hava havt gjøgnum seinastu 20 árini*



*Fyrrverandi sangarin í Skid Row, Sebastian Bach, sang sum í sínum stóru døgum, men áhoyrafjøldin var ikki so stór, sum hon plagdi at vera.*



*Steven Tyler og Joe Perry undirhalda eini 20.000 fólkum á Pepsi Arena í Albany. Aerosmith larmar sum ongantíð áður*

# Stjørnur í stórbýnum og legendur á landinum

**Tað er himmalvíður munur ímillum at verða á konsert við stjørnum í teimum bestu spælistøðunum í USA og at hoyra gloymdar bólkar spæla í einum konserthúsi á landinum. Bæði upplivilsini eru góð – men tey eru ymisk**

KONSERTIR
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo



*Dee Sneider við parykki, make-up og heila lortinum á palli í eini høll í Poughkeepsie. Frálíkt undirhald fyri teir nøkur túsund fólkini, sum vóru møtt til konsertina*

Tað er munur á at standa á pallinum í einum fullsettum Madison Square Garden – heimsins kendasta spælistað, sambært teimum sjálvum – og at headbanga í eini høll í lítla býnum Poughkeepsie norðan fyri New York.

Einaferð kendur og umsvermaður, seinni anonymur og ignoreraður. Soleiðis uppliva nógvar tónleikastjørnur sínar yrkisleið. Nógv av nøvnunum, sum flokkast á teimum størstu hitlistunum í dag, verða um nøkur ár bara ein glaður tanki hjá einum avmarkaðum tali á fólki, sum kenna teirra sangir.

Nakað soleiðis var kenslan, tá ið rocklegendur úr áttati og nítiárunum hittust til konsert í Poughkeepsie. Twisted Sister, Yngwie Malmsten, Skid Row-sangarin Sebastian Bach og Lynch Mob spældu, og tað vóru nógvir kendir sangir spældir.

Konsertin var sjarmerandi og góð, men hon stóð í kontrast til tað, sum kundi upplivast í Madison Square Garden í New York og í Pepsi Arena í Albany.

## Show business

Bon Jovi spældi í Madison Square Garden og Aerosmith og Lenny Kravitz í Pepsi Arena. Stórskíggjarnir bleiktraðu við alskyns litum, ljóðið dundi sum ein krígsmaskina, og showið var bæði sannførandi og professionelt. Milliónir í umsetningi, framúr góðar umstøður til konsertir og eitt hugtakandi sýnið yvir show business á fyrsta flokki

Hetta eru bólkar, sum framvegis kunnu fylla arenur og leikvøllir, har teir spæla. Teir selja framvegis fløgur, verða framvegis spældir í útvarpsrásum og síggjast aftur á hitlistum kring heimin.

Sama kann ikki sigast um bólkarnar, sum spældu í Poughkeepsie. Twisted Sister hava selt plátur fyri seg, men teir hava ikki somu undirtøku nú, sum teir høvdu teir høvuðsnavn á konsert við nøkrum fáum túsund fólkum, har eisini tríggir aðrir bólkar vóru á pallinum.

Her kundi tú lena teg niður á pallin, stórskíggjar vóru avloystir av nøkrum bannarum, sum vóru hongdir upp aftast á pallinum, og showið var meira imporovisera enn útspekulerað.

Tónleikur á ymsan hátt, men ein stuttlig og sjarmerandi ferð ígjøgnum eina tónleikavinnu, sum gevur upplivilsi á ymsan hátt – bæði saman við legendum á landinum og stjørnum í stórbýnum.



*Bon Jovi selir framvegis fløgur og ikki minst konsertbillettir í hópatali*